**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Økisleiðari

## til eldrarøktina í Sandoynni

Søkt verður eftir økisleiðara til Eldrarøktina á Sandoynni til setan skjótast gjørligt.

Almannamálaráðið, sum stovnurin hoyrir undir, arbeiðir í løtuni við málinum um at leggja eldraøkið út til kommunurnar. Tann, sum settur verður má tí verða fyrireikaður uppá, at broytingar kunnu koma at vera í starvinum í hesum sambandi.

Søkt verður eftir leiðara við hollum royndum, ið hevur hug og hegni at leiða og at átaka sær nýggjar avbjóðingar í skipanini. Heimarøktin er ein stovnur í støðugari broyting, og tí krevst, at umsøkjarin er fúsur at ganga nýggjar leiðir innan eldrarøkt.

**Økisleiðarin hevur ábyrgd av:**

- at leiða og fordeila arbeiðið við atliti til tørvin í økinum og fíggjarkarmin hjá Heimarøktini
- at standa fyri fakligu og starvsfólkamenningini
- at menna og samskipa Heimarøktina
- at viðvirka til støðugt økt samstarv millum ymisku starvsfólkabólkarnar, eldrasambýlini, røktarheimið og heimarøktina í økinum
- at viðvirka til samstarv við teir stovnar, skipanir og fólk, ið hava týdning fyri heimarøktina í økinum
- visitatión, revisitatión og eftirlit við tænastuni við atliti til tænastustøðið, góðskuna og fíggjarligu støðuna í økinum
- starvsvenjing hjá lesandi og næmingum
- at stýra og hava eftirlit við fíggjarstøðuni í økinum
- at lønir verða førdar yvir lønarskipanina

**Vit vænta at økisleiðarin hevur:**

- hevur hug og hegni at leiða og fyrisita
- hevur útbúgving og/ella royndir innan leiðslu og fyrisiting
- hevur royndir og kunnleika innan primeru heilsutænastuna
- sær møguleikar ístaðin fyri forðingar, og evnar at gjøgnumføra broytingar
- evnar at samstarva bæði við brúkara, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- hevur kunnleika til teldu
- hevur góðan málsligan førleika

**Setanar- og lønartreytir:**
Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Heimarøktin og Serforsorgin. Tænastustaðurin er í løtuni Sandoyarøkið.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur innan økið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra á tlf. 304020.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Att.: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarði 2, 2. hædd
Postboks 3037 · FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** Fríggjadagin 12. desember 2003 kl. 12.00.

# Til sølu

Neytafjórðingar, røst krov, seyðarhøvd og gásarungar.

**Áhugað kunnu ringja á**
**tlf. 311292 ella 254082**

Pierre Fabre



Demo-dagar 1. og 2. des.

Mánadagin 1.desember verður møguleiki at hitta Kristinu Ziska Peters, ráðgeva frá Pierre Fabre á Tjaldurs Apotek frá:
13:00 - 17:30

og á Eysturoyar Apoteki 2. desember
frá: 10:00 - 11:30
13:30 - 15:00

Vit lata 20% í avsláttri av øllum Pierre Fabre vørum hesar dagar.

Tjaldurs Apotek - Tlf: 341100 - www.apotek.fo
Eysturoyar Apotek - Tlf: 471200

Pierre Fabre

## TJÓÐVELDISFLOKKURIN
**Virðisøking í høvuðsvinnuni**

Tjóðveldisflokkurin skipar fyri almennum fundi við heitinum "Virðisøking í høvuðsvinnuni" á Tekniska skúla í Klaksvík 29. nov. 2003, kl. 14.00-17.30. Fundurin verður skipaður við einum serfrøðinga paneli og tveimum politiskum spyrjarum og frá fakfeløgunum.

**Við pallborið sita:**
Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur
Hanus Hansen, stjóri í Kjølbro
Páll Gregersen, stjóri á Fiskavirkinum í Gøtu
Rúni Hentze, útróðrarmaður og løgtingsumboð
Umboð fyri fíggingarstovn
Umboð fyri flutningsfelag

**Politisku spyrjararnir eru:**
Heini O. Heinesen, løgtingslimur
Vilhelm Johannessen, løgtingslimur

**Fakfelags spyrjarar eu:**
Aud Conradsen, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna

**Orðstýrari:**
Rani Nolsøe

TJÓÐVELDISFLOKKURIN



Sølufólk til

**Ergo & Hjálpartól**

Til søluarbeiði um alt landið verður søkt eftir royndum sølufólkið, at byrja sum skjótast.

**Starvið fevnir um:**

- Røkja verðandi viðskiftafólk.
- Uppsøkjandi søluarbeiði.
- Luttaka á messum
- Rokna út tilboð.
- Upplæring av viðskiftafólkið.

Vit bjóða eitt sera áhugavert og fjøltátta starv, har avbjóðingarnar skifta frá dag til dag.

Fólk við royndum innan hjálpartólaøkið/-ergonomi hava fyrimun, hetta er tó eingin treyt. Neyðug upplæring fer fram í Føroyum og uttanlanda.

Góður málkunnleiki í skrift og talu er ein fyritreyt, eins og koyrikort er neyðugt.

**Vit vænta at tú ert:**

- Álítandi og fryntlig/ur
- Ágrýtin
- Virðismetir góða kundatænastu

Um tú ynskir nærri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja á tel 215778 og spyrja eftir Beintu

Skrivlig umsókn við viðmælum og CV verður at senda innan 15.12.2003 til:

**Ergo & Hjálpartól**

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 • Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo

*Ergo & Hjálpartól er ein fyritøka í umfram at selja hjálpartól og ergonomiskar vørur til stovnar, sjúkrahús og privat um alt landið, eisini bjóðar ergoterapeutiska ráðgeving og viðgerð. Fyritøkan er stovna í 2001 og er í støðugari menning.*

Sosialurin 341800

# Søkt verður eftir dagrøktarum

**til Dagrøktarskipanina í Hósvíkar kommunu. At byrja 2. januar 2004**

Søkt verður eftur dagrøktarum at ansa børnum frá 0 til 10 ár.

Umsøkjarin skal vera vanur við børn, og somuleiðis hava hegni og áhuga í at menna børnini í spæli og álvara, bæði innan- og uttandura.

**Krøv:**
Tað verður kravt at umsøkjarin hevur góðar umstøður innandura og hevur girðing uttandura so børnini kunnu spæla í tryggum umstøðum.

**Umsóknarfreist:**
12. desember 2003.

Skrivlig umsókn verður at senda til

**Dagrøktarskipanin í Hósvík**
Rættarvegur 10 · 420 Hósvík

# AKADEMI-MERKONOM

## Tilmeldingin til Akademimerkonom fer fram nú!

AkademiMerkonom er ein akademi- útbúgving, sum er á útbúgvingarstigi beint undir bachelorstigi. Møguleiki verður seinni at taka yvirbygning svarandi til bachelorstig.

Fyribils er møguleiki at velja 3 breytir. Hesar eru:

- Altjóða Handil og Marknaðarførsla
- Búskapur- og Ressoursustýring
- og Leiðsla.

Komandi vár verða hesar lærugreinar:

**Tórshavn**

| | | |
|---|---|---|
| Fyriskipan (Organisation) | mikud. | 18.00-21.20 |
| Altjóða Búskapur (Global Økonomi) | mánad | 18.00-21.20 |
| Verklig Leiðsla (Ledelse i Praksis) | týsd. | 18.00-21.20 |

**Kambsdalur**

| | |
|---|---|
| Fyriskipan (Organisation) | hósdagur 18.00 - 21.20 |

Tilmeldingar til Kambsdal skulu sendast til Handilsskúlan á Kambsdali

**Tilmeldingarfreist: 15. desember**

**Upptøkutreytir:**

1. Viðkomandi yrkisútbúgving við lærugreinunum Enskt C og Støddfrøði C / Virkisbúskapur C (t.d. útbúgving innan skrivstovu, handil ella handverk)
2. Viðkomandi grundútbúgving við lærugreinunum Enskt C og Støddfrøði C ella Virkisbúskapi C (t.d. tikin á VUC í DK)
3. Miðnámsútbúgving antin við støddfrøði C ella við Virkisbúskapi C
4. Onnur viðkomandi útbúgving svarandi til støði nevnt í pkt. nr. 1-3

Umsøkjarin skal hava minst 2 ára viðkomandi vinnulívsroyndir aftaná at hava lokið miðnámsútbúgving. Skúlin kann taka upp umsøkjarar, sum ikki lúka upptøkukrøvini í stk. 1, har útbúgvingartreytirnar hjá umsøkjaranum kunnu javnmetast við omanfyrinevndu krøv og treytir.

**Undirvísingin byrjar í viku 4 í 2004**

Fleiri upplýsingar eru at finna á heimasíðu skúlans **www.fh.fo**. Møguleiki er eisini at fáa upplýsingar um AkademiMerkonom-útbúgvingina á heimasíðuni hjá Undervisningsministeriet **www.uvm.dk** og **www.akademimerkonom-udd.dk.** Millum annað eru upplýsingar at finna um avriksflutning frá gomlu Merkonom útbúgvingini til AkademiMerkonom útbúgvingina.

**Kostnaður:**

| | |
|---|---|
| Depositum, fyri hvønn persón | kr. **250,00** |
| Akademimerkonom, fyri hvørja lærugrein | kr. **1800,00** |

Tilmmeldingarseðil liggur á heimasíðu skúlans **www.fh.fo**

## FØROYA HANDILSSKÚLI

Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel 317177, Fax 313374
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, Tel 444900, Fax 444901
www.fh.fo

# Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg